# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
Jákup Mørk
jalup@sosialurin.fo
tlf 341800

*– Nú eri eg venjari her suðuri, og so fokuseri eg sjálvandi upp á tað*

*Finn Johannesen, nýggjur venjari í VB/Sumba, sum byrjar við dysti ímóti barndómsfelagnum KÍ*

# Jákup Mikkelsen brotið nøsina

**Landsliðsmálverjin hevur brotið nøsina og er tískil ógvuliga ivsamur til dystinum í móti EB/Streymi, har sundalagsmenn mugu vera miðverjuleikaran Marna Djurhuus fyri uttan**




FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Herfyri segði Sigfríður Clementsen, B36 venjarin, at meistaraheitið var farið norð á Mølina til EB/Streym, og seinasta leygardag gjørdi B36 EB/Streymi eina rimmar tænastu, við at lata seg eyðmýkja av klaksvíkingum í Gundadali, og harvið avskrivað seg sjálvar í oddastríðnum.

Sunnudagin hittast B36 og EB/Streymur so í Gundadali, og tá verður helst endaliga staðfest, um B36 kann melda til aftur millum tey fremstu, ella um EB/Streymur kanska fer at seta eina tjúkka striku undir, at teir eru besta liðið í føroyskum fótbólti í løtuni.

### Jákup brotið nøsina

Mikudagin vóru teir báðir Jákup Mikkelsen og Fróði Benjaminsen við í landsdystinum móti Georgia. Teir spældu báðir allan dystin á tamb, men var tað ikki uttan trupulleikar, at Jákup Mikkelsen fullførdi teir 90 minuttirnar.

Einaferð miðskeiðis í seinna hálvleiki kom Jákup Mikkelsen einsamallur út ímóti einum georga, sum royndi at trekkja framvið, men í staðin rakti bein hansara í nøsina á Jákup.

Eftir dystin vísti tað seg, at Jákup Mikkelsen hevur brotið nøsina, og tí ivast tey í B36 í, um landsliðsmálverji teirra verður tøkur.

Áður er sætt, at fótbótlsspælarar hava spælt við eini verndarmasku fyri andlitið, og um tað verður við eini slíkari, at Jákup Mikkelsen kemur á vøllin við sunnudagin, fer tíðin at vísa. Um Jákup Mikkelsen ikki verður við, fer ungi Jóan Pauli Jacobsen at standa millum stengurnar.

Annars lata tey úr árstalsfelagnum væl at. Bergur Midjord og Mikkjal Thomasen eru farnir at venja aftur eftir hvør sín skaða, og í mun til undanfarna dyst, so eru teir báðir Klæmint Matras og Herbert í Lon Jacobsen við aftur eftir leikbann.

### Egil við og Marni úti

Hjá EB/Streymi stendur eisini heilt væl til. Einasti maðurin, sum ikki er tøkur er Marni Djurhuus. Seinasta dyst varð hann fluttur beinleiðis av vøllinum og suður á Landssjúkrahúsið, men hetta spældi alt tíbetur væl av. Tó ikki betur enn so, at Marni Djurhuus ikki verður við sunnudagin, og neyvan heldur mikudagin í móti ÍF.

Hann skal seinnapartin í dag út á Landssjúkrahúsið at taka fleiri myndir av bringuni fyri at staðfesta, hvørt hann hevur brotið okkurt riv ella ikki.

At skula vera Marna Djurhuus fyri uttan er ein eyðsýndur missur, men í Sundalagnum fegnast tey tó um, at liðformaðurin Egil á Bø er við aftur, eftir at hann var leikbannaður í móti HB.

Tað stutta av tí langa er tí, at talan verður um tvey væl mannaði lið, ið tørna til í Gundadali sunnudagin, har øll trý stigini eru av stórum týdningi fyri báðar partar, men har sundalagsmenn tó kunnu liva við einum javnleiki.

## Katrin góðar vónir til HM

**Sunnudagin byrjar HM í rógving, og millum teir mongu luttakararnar, sum skulu verða við, er føroyska Katrin Olsen. Góðar vónir eru til, at hon kann vinna heiðursmerki**

RÓGVING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Heimsmeistaraskapið í rógving verður hilgð í Eton í Onglandi frá sunnudegnum og eina viku fram. Fleiri enn 1000 róðrarfólk úr 64 londum verða við í stóru kappingini, sum er tann største rógvikappingin, ið nakrantíð hevur verið hildin í Onglandi.

Katrin Olsen er við á danska liðnumí kappingini, og Danmark hevur seks bátar við. Í fyrstu syftu skuldu átta bátar taka lut, men skaðar hava havt við sær, at tveir bátar hava verið noyddir at geva avboð.

Katrin Olsen rør umborð á dupultfýraranum í léttvekt, og hon hevur tríggjar danska liðfelagar umborð. Vónirnar eru góðar til, at júst hesin báturin kann vinna heiðursmerki í sterku kappingini.

Ítróttarstjórin hjá danska róðrarsambandinum roknar við, at tríggir bátar hava møguleikan at vinna heiðursmerki – ein teirra er báturin hjá Katrin og teimum.

– Hesar tríggjar manningar hava róð sera støðugt og hava veruliga fingið ferð í bátarnar, so tað verður eitt stórt vónbrot, um tær ikki vinna heiðursmerki, sigur Lars Christensen.

Higartil í ár hava Katrin og tær bert kappast í tí tyngra klassanum, og har hava úrslitini verið sera góð. Tí eru Katrin Olsen, Kirk Jepsen, Sine Christiansen og Juliane Elander væl fyri at kappast í tí léttara klassanum nú. Sagt verður, at kvinnurnar eru sera væl fyri til HM, og alt annað enn eitt heiðursmerki í HM verður eitt stórt vónbrot.

Fyrsti kappingardagurin í HM í rógving verður sunnudagin, og síðani verður hildið fram við kappingum alla næstu vikuna.

# Finn móti sínum egnu

**VB/Sumba fer ikki norður fyrrenn sunnudagin, og teir ætla ikki, at KÍ skal endurtaka úrslitið frá í Vági**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Ein av marrkukendastu uppgerðunum hjá VB/Sumba higartil í ár var, tá ið teir á heimavølli á hvítusunnu vórðu spældir sundur og saman av KÍ, sum vann 7-1. Frammaundan hevði KÍ vunnið 3-0 á heimavølli móti samansetta liðnum.

Sunnudagin skal VB/Sumba til Klaksvíkar. Nýggir menn hava ábyrgdina av suðuroyarliðnum. Nú eru tað fyrrverandi málverjin, Bjarni Johansen, og Finn Johannesen, sum hava ábyrgdina.

Finn er klaksvíkingur. Í síðstu viku var hann í Everton og fylgdi venjingum har. Tí verður tað hjá klaksvíkinginum talan um fyrstu uppgávuna á beinkinum hjá VB/Sumba, tá ið teir sunnudagin fara at spæla í Klaksvík.

– Nú eri eg venjari her suðuri, og so fokuseri eg sjálvandi upp á tað. Vit eru avgjørdir í, at talan skal ikki vera um endurtøku frá avrikunum móti KÍ fyrr í ár. Onkra ferðina hevur VB/Sumba staðið seg væl í Klaksvík, og vit hava gott mót, sigur Finn Johannesen.

Allir spælararnir eru tøkir. Eisini Evrard Ble, sum var leikbannaður móti GÍ. Ofta eru vágbingarnir og sumbingarnir farnir norður um leygardag, tá ið teir skulu spæla sunnudag. Soleiðis verður tað ikki hesa ferð. Teir fara ikki frá húsum fyrrenn sunnumorgunin.

– Fleiri eru familjumenn, og vit halda ikki, at tað tænir nøkrum endamáli, at teir skulu vera burturi frá familjuni tað mesta av vikuskiftinum. Harafturat eru fleiri mitt í viku í Havnini. Teir koma suður í kvøld, og so venja vit bæði í kvøld og í morgin, sigur Finn Johannesen.

### Ivi um Oddmar

Fótbóltslagið er gott í Klaksvík eftir størsigurin í Gundadali móti B36. Teir siga seg vera tilvitaðar um vandan, sum altíð lúrir, tá ið tað í undanfarna dysti hevur gingið so væl. Teir ætla, at úrslitið skal vera betri í vikuskiftinum, tá ið sjómannadagurin er, enn tað var, tá ið summarfestivalurin var á skránni. Ta ferðina tapti KÍ 4-1 móti EB/Streymi.

Oddmar á Lakjuni var burturstaddur, tá ið KÍ spældi móti B36. Hann er komin til hús aftur, men tað er ivasamt, um hann verður tøkur móti VB/Sumba. Undir venjing týskvøldið varð hann skaddur, og Oddmar hevur ikki vant síðani.

Hóskvøldið vandi Heðin á Lakjuni ikki orsaka av sjúku. Annars eru allir klaksvíkingarnir tøkir.

– Takið verður at fáa verjuna tagaða sundur. Tað hava vit arbeitt við í hesi vikuni, og so skulu vit vera ansnir og sera tilvitaðir um, at VB/Sumba hevur ógvuliga vandamiklar kontraspælarar, siga teir í Klaksvík.